

# TÁ HEIMURIN HJÁ **HANS EDWARDI** STEÐGAÐI UPP

HANN VIL LATA **HJARTABLÓÐ** FYRI AT SKRIVA EIN GÓÐAN SANG, OG TÁ IÐ HANN FEKK EINA **SKRIVIBLOKERING** Í EITT HÁLVT ÁR, VAR TAÐ SUM UM HEIMURIN **STEÐGAÐI**. - TÁ EG IKKI KLÁRI AT VERÐA TAÐ, SUM EG VIL VERA, SO ER TAÐ HEILT **FORFERDILIGT**, SIGUR **HANS EDWARD ANDREASEN**, SANGARI Í ROCKBÓLKINUM **THE DREAMS**



INTERVIEW
Eyðun Klakstein
eydun@sos.fo

Hann er kendur og eyðkendur sum tann framfýsni sangarin í rockbólkinum The Dreams. Við síni sterku og orkufullu rødd, reyða hanakambi og sterku persónligheit røkkur Hans Edward Andreasen langt út um pallkantin. Hann er er eisini sangskrivarin, sum brennir fyri tónleikinum, og vil lata hjartablóð fyri at skriva ein góðan sang.

Men hann hevur eisini løtur, har tað gongur illa, har hann er í ringum lag og tyngdur, tí hann ikki megnar at skriva sangirnar, sum hann so fegin vil skriva. Tá er hann ikki grannhavandi og vil bara hava frið.

Hans Edward Andreasen hevur seinastu sjey árini brúkt nógva tíð og orku til tónleikin. Fyrst var tað í tónleikabólkinum Zink, og síðani 2006 hevur The Dreams verið miðdepilin fyri hansara tónleikaliga virksemi.

Í hesum døgum eru The Dreams á konsertferð í Týsklandi. Á skránni hava verið 18 útseldar konsertir, har The Dreams hava hitað upp fyri bólkin Emil Bulls. Hetta er ein kendur rockbólkur í Týsklandi, og teir spæla vanliga á støðum, sum rúma millum 2000 og 7000 áhoyrarar. The Dreams hava eisini gjørt vart við seg á MTV hitlistanum Rockzone, og nú verður roynt at føra aðru stakfløguna fram - tað er sangurin Under The Sun, sum er væl kendur á okkara leiðum.

## Tað perfekta kritiserað

The Dreams spældi nakað síðani eitt sonevnt showcase í Týsklandi. Tað er ein framførsla fyri fólki í tónleikavinnuni. The Dreams fekk sera góð ummæli fyri framførsluna, og tey, sum høvdu hug at finnast at, søgdu, at bólkurn var so perfektur, at hann mátti verið samansettur sum eitt konsept.

Men The Dreams hevur eina veruliga søgu. Teir eru ungu menninir úr Havn, sum hava funnið saman og støðugt arbeitt seg framá. Her er ikki talan um nakra kommersiella samanseting av tónleikarum.

- Tað er sera umráðandi ikki at fáa eitt sett eitt slíkt skelti á seg, tí tað eru so nógvir falskir tónleikabólkar har úti, sum ikki ein gongd gera sín egna tónleik og eru sett saman av fyritøkum. Vit royna alt, hvat vit kunnu, fyri at vísa hvørjir, vit veruliga eru, og tá vit gera tað, so skal tað eitast at verða for perfekt, og tað er keðiligt, sigur Hans Edward.

- Vit eru ikki ein bólkur, sum er samansettur. Vit hava funnið saman og hava valt hvønn annan at spæla saman við. Vit gera tónleikin sjálvur, og eg skilji ikki teir bólkar, sum stilla seg fram, og ikki ein gongd skriva sín egna tónleik.

## Tá blokeringin rakar

Hans Edward Andreasen skrivar nógvar av sangunum hjá The Dreams. Onkursvegna er tónleikur hjá teimum eitt felags projekt, men tað er einki at fjala útyvir, at Hans Edward er ein drívmegi í bólkinum, tá tað kemur til at skriva og framleiða sangir.

Og tí rakar tað hann meint, tá ið hann ikki fær skrivað sangir. Tá ið The Dreams arbeiddi við seinastu fløguni, Revolt, stegðaði fullkomiliga upp hjá Hans Edwardi.

- Vit høvdu gjørt einar seks sangir til fløguna, og vit høvdu sett eina deadline, og so fekk eg eina skriviblokering. Tað steðgaði fullkomiliga hjá mær, og eg fekk ikki skriva nakað í eitt hálvt ár. Tú kanst fyristilla tær, hvussu langt niður, mann kann fara av tí, sigur Hans Edward.

- Eg havi upplivað tað fyrr at fáa eina blokering, og tá virkar tað, sum nú er tað slutt. Eg kenni tað, sum nú fari eg ongantíð aftur at kunna skriva sangir.

- Eg havi tosað við nógvar tónleikarar um hetta, og øll hava upplivað tað, men eg taki tað kanska til tað ekstrema, tí eg verði so ræðuliga keddur, tá eg ikki fái skriva sangir. Hetta er nógv meira enn eitt arbeiði ella eitt ítrív fyri meg. Hetta er mín lívsstílur, hetta er tað, sum eg eri og geri, og tað, sum fólka síggja meg sum. Og tá eg ikki klári at verða tað, sum eg vil vera, so er tað heilt forferdiligt, sigur Hans Edward.

- Hjá mær er tað kanska eitt sindur destruktivt, tí tað er eingin millumvegur. Eg blívi so ræðuliga glaður, tá eg skrivi ein góðan sang, og